# ítróttur

Nr. 184 • týsdagur • 30. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kanónár hjá 99 ára gamla HB

**Umframt 17. FM heitið í fremstu røð tykist framtíðin at síggja bjørt út, tí HB hevur vunnið FM í ungalingadeildini, piltadeildini og smápiltadeildini**

SAMANUM 17. UMFAR

*Jóannes Hansen*



*Tá ið mest ráddi um, vísti HB, at teir eiga meistaraskapin uppibornan. Í 11. umfarinum vunnu teir á heimavølli 1–0 á NSÍ, í 16. umfarinum vunnu teir 2–0 ímóti B68 í Gundadali, og sunnudagin vunnu teir 2–0 á B36*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

HB er føroyameistari 2003. Hjartaliga tillukku við tí. Við seytjanda meistaraheitinum hevur HB endiliga fingið KÍ aftur. Gongdin seinastu fjórðings øldina hevur boðað frá, at tað var bara ein spurningur um tíð, áðrenn HB fór at fáa klaksvíkingarnar aftur. Nú hava teir gjørt tað. Spurningurin er so, um tað fer at verða annað av hesum feløgunum, sum næsta ár, tá ið bæði feløgini fara at runda tey eitt hundrað árini, fer at leggja seg einsamalt á odda í samlaðu FM kappingini síðani 1942. KÍ vann fyrsta FM heitið í 1942. HB vann ikki fyrsta FM heitið fyrrenn í 1955. Næsta FM heitið vunnu teir í 1960. Tá hevði KÍ verið meistari átta ferðir.

Leygardagin fær HB vitjan av javnaldranum úr Klaksvík. Tað er greitt, at HB leygardain fyri annað árið á rað fer at fáa FM steypið og gullkrónurnar, meðan klaksvíkingar skulu berjast fyri at verja fimta plássið. Vánirnar, fyri at tað skal eydnast, eru einki serligar. Fleiri av spælarunum eru leikbannaðir eftir gul kort ímóti NSÍ, og onkur spælari verður burturstaddur.

HB hevur verið oddalið so at siga síðani kappingarbyrjan í ár. Hesar seinastu vikurnar hava B36, B68 og eisini NSÍ kjálkast fram ímóti oddasessinum, tí HB misti stig ímóti lægri staddu feløgunum. Eitt nú megnaðu teir ikki meiri enn málleysan javnleik ímóti illa stadda VB í Gundadali og esini javnleik á Mølini.

Men tá ið mest ráddi um, vísti HB, at teir eiga meistaraskapin uppibornan. Í 11. umfarinum vunnu teir á heimavølli 1–0 á NSÍ, í 16. umfarinum vunnu teir 2–0 ímóti B68 í Gundadali, og sunnudagin vunnu teir 2–0 á B36.

## Fleiri FM

Nógvu tey seinastu árini hevur HB vunnið nógv fleiri FM heiti í yngru deildunum, enn øll hini feløgini hava vunnið tilsaman. Aftur í ár hevur HB gott tak á yngru deildunum. Unglingarnir vunnu í síðstu viku FM finaluna ímóti EB/Streymi, piltarnir hava vunnið FM heitið, og smápiltarnir eru eisini meistarar.

Á kvinnusíðuni hevur ikki hilnast so væl hjá HB, men tað tykist vera vón fyri stavn. HB hevur í ár vunnið FM og steypakappingina í deildini fyri gentur 14–17 ár.

Á minussíðuni hjá HB stendur ivaleyst, at tað ikki eydnaðist teimum at vinna Løgmanssteypið. Teir stíla høgt á hvørjum ári, og teir eru ikki heilt nøgdir, uttan at teir hava vunnið bæði FM og steypakappingina, men tað munnu teir ikki hugsa so nógv um akkurát nú.

Sunnukvøldið var rómur í høvuðsstaðnum og í HB húsinum. Millum spælararnir eru fleiri við rættuliga nógvum royndum. Áður hevur onkur teirra sagt, at teir fara at gevast. Men eftir sigurin á B36 og aftaná at tað var greitt, at HB aftur var meistari. vildi ein týðuliga rørdur Jan C. Dam og aðrir veteranar ikki siga nakað um, hvussu tað verður við framtíðini.

Hóast HB eigur og altíð hevur átt nógvar góðar ungar fótbóltsspælarar, so er tað merkisvert, at seks av teimum fyrstu ellivu, sum vóru á liðnum ímóti B36, eru uppvaksnir í øðrum feløgum. Her verður hugsað um Símun Eliasen, sum í yngru árunum spældi í ÍF, Rógva Jacobsen, sum er uppvaksin í KÍ, Tór–Ingar Akselsen, sum hevur spælt í Sandavági og FS Vágum, Rúna Nolsøe, sum áðrenn hann fyri ellivu árum síðani kom til Havnar, hevði spælt við VB, og Nicu Dogaru, sum ikki hevur spælt í Føroyum fyrrenn hesi seinastu árini. Hinir, sum mannaðu liðið sunnudagin eru og hava altíð verið HBarar. Teir eru Bárður Johannesen, Janus M. Joensen, Hans á Lag, Jan C. Dam (onkur ár í øðrum feløgum) og Hall Danielsen. Annar innskiftarin, Andrew av Fløtum, hevur altíð verið HB spælari, meðan hin, Kári Nielsen, er ættaður av Sandi. So tað eru ivaleyst mong manga staðni, sum á onkran hátt kanna sær part av HB meistaraheitinum.

## Botnurin ógreiður

B68 styrkti við heimasigri á GÍ um sín silvurmøguleika. B36 og B68 fara leygardagin á útivølli at finna út av, hvat teirra skal hava silvur og hvat lið skal hava bronsuna. Toftamenn skulu til Vágs, og B36 skal til Gøtu. Bæði B68 og B36 skulu næsta ár spæla í UEFA Cup undankappingini. HB skal spæla í undanumfarinum til meistarakappingina, og NSÍ skal spæla í Intertoto Cup. GÍ, sum øll árini síðani 1994 hevur verið í altjóða kappingum, sleppur ikki upp í part næsta ár.

Í botninum hevur Skála ikki givið skarvin yvir. Sum seinasta kappingarár eru teir farnir undir endaspurt. Sunnudagin vunnu teir 4–3 í Miðvági. Skála er framvegis aftast, men teir kunnu fáa FS Vágar aftur. Tvey stig eru á muni. Fyrsta treytin hjá Skála er, at teir leygardagin vinna á heimavølli ímóti EB/-Streymi, sum skal spæla fyri fyrstu ferð nakrantíð at vinna fimta plássið. Um teir skulu sleppa upp á níggjunda plássið, so er hin treytin, at FS Vágar einki fær í Runavík. NSÍ hevur einki uttan æruna at spæla fyri. Teir eru og verða nummar fýra.

ÍF er nýtt lið í bestu deildini, og næstaftasta liðið í 1. deild skal spæla um pláss í 1. deild ímóti TB. Tríggir møguleikar eru fyri næstaftasta plássinum. Um botnliðini ikki fáa stig leygardagin, so verður FS Vágar næstaftast og harvið mótstøðulið hjá TB. Skála og VB eru hinir møguleikarnir.

## Meira um meistararnar

Í blaðnum í morgin hava vit samrøðu við gylta HB-venjaran, Frank Skytte.





*Hóast til tíðir stóra fráveru, so helt HB allan vegin heim til gullið. Ikki minst takkað verið breiddini í hópinum og væl skipaða spælinum, sum alla tíðina gav liðnum eitt trygt grundstøði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tað var liðið, sum gjørdist meistarar

**Sjálvsagt vóru einstakir leikarar, sum høvdu sín stóra lut í gullinum, men fyrst og fremst var tað liðið hjá HB, sum í ár tryggjaði sær meistaraheitið**

FØROYAMEISTARAR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn er ein dystur eftir at spæla hetta kappingarárið, so enn eru allar súður ikki syftast. Men ein staðfesting er í øllum førum greið. HB eru føroyameistarar. Við sigrinum á B36 syrgdu teir fyri, at tað ikki verður nakar, sum tekur teir aftur í ár, og sostatt eru teir nú komnir ájavnt KÍ, sum annars hevur havt einkarætt sum mest vinnandi føroyska fótbóltsfelagið í landskappingarhøpi.

## Breiddin stóð sína roynd

At HB hevur verið besta liðið í ár, er nokk eingin ivi um. Liðið er tað, sum hevur flestu stigini á stigatalvuni, og so er væl ikki meira at trætast um í so máta.

Skal ein meting gerast av, júst hvørjir eginleikar tað vóru, sum tryggjaðu HB hetta meistaraheitið, so eru serliga tríggir lutir. Breidd, organisatión og botnstøði.

Breiddin í hópinum slapp veruliga at standa sína roynd fyrstu mánaðirnar av árinum. At byrja við mátti liðið klára seg uttan mest sum allar teir, sum i´fjør vóru við til at vinna meistaraheitið. Jan Dam gjørdi tó av at taka eitt tørn afturat, og saman við Janus M. Joensen skuldi hann so vera tann, sum kundi geva nýggju monnunum neyðuga sjálvsálitið. At Martin Christensen byrjaði árið við drúgvum skaða, mundi neyvan styrkja um vónirnar, og tá Jan Dam so eisini breyt stórutá í Runavík, sá heilt svart út. Men HB megnaði hetta. Ikki minst tí teir í Eli Christiansen áttu ein leikara, sum alla tíðina var klárur til at fara inn í verjuna, men so sanniliga eisini tí Hans á Lag gjørdi av at koma aftur úr síni fótbóltsútlegd. Hann var kanska ikki heilt á toppinum at byrja við, og onkur avrik vóru nakað rustað, men mentalt er hann gjørdur úr júst rætta slagnum, tá tosast skal um vinnaramentalitet.

At verjan soleiðis gjørdist alt betri mannað, kom so sanniliga eisini miðvøllinum til góðar. Her fekk HB annars nakað av trupulleikum, tá Nico Dugaru fekk álvarsligan skaða, men við fleiri alternativum í verjuni kundi Hallur Danielsen nú flytast upp. Hann varð annars settur í verjuna, tá Frank Skytte seg meta, at hann var leikarin, sum miðvøllurin best toldi at missa, men eftir flytingina hevði hann sítt kanska besta kappingarár fyri HB. Tá Martin Chrsistnsen loksins varð tøkur, var tað eisini á miðvøllinum, at hann varð nýttur, og eisini hann gjørdi eitt framúr arbeiði her.

Og so skal eisini sigast, at heldur íkki í álopinum slapp HB undan umskipanum. Her hevði felagið undan árinum keypt Karsten From heim, og roknað varð við, at hann saman við Andrew av Fløtum skuldi skjóta neyðugu málini. Byrjanin var eisini góð, og nýggi maðurin skeyt nógv mál í steypakappingini, men so fór at ganga skeiva vegin. Menniskjansliiga sampakkaði danin ikki nóg væl við restina av hóppinum, og endin varð, at felagið og leikarin í felag boðaðu frá, at sáttmálin varð uppsagdur. Tá Andrew samstundis ikki fekk fylgt upp uppá góða avrikið í fjør, stóð greitt, at málini máttu koma aðra staðni frá, og tað komu tey eisini. Rógvi Jacobsen varð fluttur fram sum centerforward, og tó at talan kanska ikki var um mál í rúgvuvís, so gav hann liðnum nakrar heilt aðrar dimensiónir frameftir vøllinum. Og so skal eisini nevnast, at Tór-Ingar Akselsen veruliga fekk sítt gjøgnumbrot í seinnu kappingarhálvu. Fleiri ferðir var hann maðurin handan týðandi skoringar, og tó at hann ikki hevði sín besta dag nú sunnudagin, so mundi tað fyri mong kennast hóskandi, at tað var júst hann, sum skeyt málið, sum av álvara sendi HB á meistarakós.

## Skipanin var grundarlagið

Sum venjari megnaði Frank Skytte í sera stóran mun at byggja víðari á grundina, sum Ion Geolgau í nærum fimm ár hevði bygt í HB. Her hevði rumenin alla tíðina lagt dentin á eina væl skipaða verjuskipan, har alt liðið tók lut í defensiva arbeiðinum, og tó at broytingar vórðu framdar, so helt liðið alla tíðina fast í grundstøðinum. Við einari flatari verju, sum dugdi at spæla flatt – t.v.s. samstundis halda dýpdina – skuldu mótstøðuliðini ofta finna tær heilt stóru snildirnar fram, um málini skuldu koma, og ein hart arbeiðandi miðvøllur syrgdi hartil fyri, at verjan í stóran mun slapp heilt undan at koma undir trýst.

At liðið hevði eitt somikið trygt grundstøði var helst eisini viðvirkandi til, at liðið at kalla ongan tíð leikti ein vánaligan dyst. Kanska var tað ikki hvørja ferð, at talan var um spruttandi álopsfótbólt, men aloftast var tað nóg mikið til at fáa stig heim og helst trý av slagnum. Sum so mundi tað vera heppið, at einasti dysturin, har liðið veruliga spældi illa, var ímóti einum VB liði, sum bert var komið í Gundadal fyri at verja.

Hetta sama grundstøðið var eisini nakað, sum viðførdi, at liðið hevði eitt sindur lættari við at spæla sum eitt oddalið. Skilt á tann hátt, at tað sjáldan kom í ta støðu, at spælið varð flutt ov langt aftur á vøllin. Líka mikið, hvussu støðan var, so kendi hvør einstakur leikari sína uppgávu, og tí kundi liðið aloftast bara halda á fram við positiónsfótbólti, tá ein leiðsla skuldi verjast. Heldur enn at standa afturi í egnum brotsteigi og sparka langt – og harvið koma undir óneyðuga stórt trýst.

## Lyklaleikarar

Og at enda, so slepst heldur ikki at nevna einstakar leikarar, sum kanska høvdu eyka stóran týdning fyri meistaraheitið. Í málinum hevur HB seinnu árini havt kanska mest undirmetta føroyska málverjan í Bárði Johannesen. Ikki minst hevur tað tikið honum langa tíð at verða góðtikin av áskoðarunum sum maðurin, sum skuldi loysa Kaj Leo Johannesen av, men hesa accept tykist hann tó nú hava fingið. Og at tað ikki bert er í HB, at hendan er komin, vitnar landsliðsúttøkan í vár eisini um. Har stendur hann kanska enn í skugganum av Jákupi og Jens Martini, men fáur man tó ivast í, at hann nú skjótt má roknast sum tann, ið er teimum næstur í føroyska málverjahierarkinum.

Skal nakar takast burtur úr í verjupartinum, so má tað nokk blíva Símun Eliasen. Tað eru kanska nøkur ár síðani, at hann seinast var partur av HB-liðnum, men trupulleikarniar at fella inn á liðið vóru at kalla eingir, og saman við Jan Dam stýrdi hann verjuni við somikið stórum myndugleika, at ein landsliðsúttøka tykist alt meira nærliggjandi.

Á miðvøllinum var Rúni Nolsøe enn einaferð lyklaleikarin, sum tað mesta av øllum HB-spælinum gongur ígjøgnum. Hartil er hann eisin í stóran mun stýrimaðurin, tá trýst skal leggjast á mótstøðuliðini, so samanlagt kann týdningur hansara fyri liðið neyvan yvirmetast.

I álopinum hevur talan kanska ikki verið um nakran einstakan leikara gjøgnum árið, sum hevur sett sítt stóra frámerki. Hinvegin hevur tað verið ein styrki hjá liðnum, at teir mest sum hvørja ferð hava fingið mál onkra staðni frá. Júst hvør skjúttin hevur verið, hevur ikki havt tann stóra týdningin í so máta, og tað munnu hvørki leikarar ella viðhaldsfólk leggja nakað serligt í. Tey fegnaðust heldur um útvarpslýsingina sunnukvøldið. Hon boðaði frá »at AFTUR í ár verður gulldansur í HB-húsinum«. Hvussu leingi hetta helt á, hava vit ikki fingið greiðu á, men einki er at ivast í, at tað á nógvum arbeiðsplássum í høvuðsstaðnum var ein ávís frávera mánadagin.